## Bíbliutímar til ungfólk

10 bíbliutímar til ungfólk eru kjarnin í nýggja bóklinginum »Andin Lívgar«. Til hvønn bíbliutíma er bíbliutekstur, ein stutt útlegging og nakrir spurningar til umhugsanar. Eisini er pláss hjá lesaranum at gera egnar viðmerkingar. Spurningarnir leggja ofta upp til sjálvrannsakan,og tað ger bóklingin væl egnaðan at lesa bæði hjá einstaklingum og í bólkum. Tað er Heimamissiónsfelagið, sum gevur út bóklingin »Andin Lívgar«, sum Hjørleif Poulsen og Amy Tausen hava týtt. Torfinn Jacobsen hevur myndprýtt.




## Vágs Kommuna meldað

Umhvørvisstovan upplýsir á heimasíðu síni, at støðan er tann, at Vágs kommuna hevur tikið eini hús niður og síðan brent tey á báli á Eiðinum í Vági. Umhvørvisstovan hevur tosað við Vágs kommunu, sum játtar, at tað er kommunan, sum hevur staðið fyri bálbrenningini. Umhvørvisstovan sigur, at hetta er greitt brot á kunngerðina um burturkast og tey halda, at nettupp hetta málið er sera óheppið, tí tað er kommunan sjálv, sum er eftirlitsmyndugleikin á økinum.

# Ongin semja um portørarnar enn




*Starvsmannafelagið samráðist nú fyri portørarnar, men tað dregur út ásannar Selma Ellingsgaard,forkvinna*

**Tað verður ikki fyrrenn í heyst, at samráðingarnar um illa umstrídda lønarsáttmálin fyri portørararnar, verða lidnar**

PORTØRAR
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hóast tað skjótt eru tvey ár síðani, at lønarsáttmálin hjá portørunum gekk, út, eru ongi útlit fyri, at semja fæst um nýggjan sáttmála fyrrenn einaferð í heyst.

Sáttmálin millum fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag gekk út í oktober 2007, men hann er síðani longdur. Men hesi seinastu trý árini hevur rættiligt rok verið um, hvør tað nú er, sum skal samráðast fyri portørarnar. Nógv teir flestu portørarnir hava meldað seg inn í Starvsmannfelagið, sum eisini kravdi at fáa samráðingarrættin og enntá hótti við verkfalli, fekk felagið ikki sín vilja.

Nakrir portørar eru kortini eftir í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum tvíhelt um at varðveita samráðingarrættin.

Málið endaði í fasta gerðarrættinum, sum gav Starvsmannafelagnum viðhald í at fáa samráðingarrættin fyri limir sínar.

- Vit løgdu upp til felags samráðingar, har vit og Havnar Arbeiðsmannafelag samráddust um nýggjan sáttmála og hóast nakrir fundir hava verið, hevur Havnar Arbeiðsmannafelag ikki møtt upp, sigur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Samstundis hevur fíggjarmálaráðið gjørt púra greitt, at tað verður bara ein felags sáttmáli gjørdur fyri alt økið. Av tí sama er møguleikin fyri, at Starvsmannafelagið fær ein sáttmála fyri teirra portørar og Havnar Arbeiðsmannafelag fær ein sáttmála fyri teirra portørar, útihýstur.

Selma Ellingsgaard sigur, at sostatt samráðist Starvsmannafelagið við fíggjarmálaráðið um nýggjan sáttmála fyri portørarnar, sum eru í felagnum.

Men samráðingar eru drúgvar og ein orsøk til tað er, at endamálið er at laga tann nýggja sáttmálan til, so at hann líkist hinum sáttmálunum hjá Starvsmannafelagnum og tí skal allur sáttmálin gjøgnumgangast.

Nú verður so steðgur í samráðingunum til eftir summarfrítíðina og sostatt væntar forkvinnan í Starvsmannafelagnum ikki, at nakað úrslit spyrst burtur úr fyrrenn í heyst – men tá væntar hon eisini, at eitt úrslit fæst.

# Portørar mist møguleikan at fáa ein góðan sáttmála

**Havnar Arbeiðsmannafelag ætlar sær ikki nú at samráðast saman við Starvsmannafelagnum um nýggjan sáttmála fyri portørarnar, men Hans Joensen, formaður, átalar framferðina í málinum**

PORTØRAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sum støðan er nú, eru vit ikki sinnaðir at samráðast saman við Starvsmannafelagnum um nýggjan sáttmála fyri portørarnar.

Tað sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Sum tað sæst í aðrari grein her í blaðnum, vísur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, á, at tey høvdu lagt upp til at samráðst við fíggjarmálaráðið um ein nýggjan portør sáttmála, saman við Havnar Arbeiðsmannafelag.

### Noktaðu

Men Hans Joensen ivast stórliga í, hvussu heilhjartað Starvsmannafelagið og fíggjarmálaráðið vilja hava Havnar Arbeiðsmannafelag upp í.

- Veruleikin er, at vit hava bara eina einastu ferð fingið fundarboð um portørsáttmálan. Men tann fundin bar ikki til at møta, tí hann skuldi vera samstundis sum arbeiðsgevarar høvdu kallað øll arbeiðarafeløgini á fund at tosa um at strika lønarhækkingina, sum skuldi vera 1. mai.

- Tí bóðu vit um útsetilsi, men tað var kortanei- og síðani hava vit ongantíð fingið fundarboð.

Hetta heldur Hans Joensen lítið um, tí hann sigur, at Havnar Arbeiðsmannafelag gekk við til at útseta nógvar fundir fyri at sleppa undan at verkfalli, tí tað hevði Starvsmannafelagið hótt við, varð sáttmáli gjørdur við Havnar Arbeiðsmannafelag um portørarnar.

- Fyri at sleppa undan eini keðiligari støðu, gingu vit við til fleiri útsetilsi, men fyrstu ferð, vit bóðu um tað, varð tað noktað.

### Mist møguleikan

Og nú sigur hann, at Havnar Arbeiðsmannafelag er ikki sinnað at fara í nakrar samráðingar.

Merkir hetta, at tit hava uppgivið tað fakøki, sum eitur portørarnar og hava latið tað yvir til Starvsmannafelagið?

- Tað er ikki so nógv hjá okkum at gera, tí tað vísir seg, at allir partar, eisini fakfeløg, hava góðtikið, at tað skal bera til hjá einum fakfelag at nápa eitt øki frá einum øðrum felag, sigur Hans Joensen.

Men hann heldur eisini, at nú hava portørarnar mist møguleikan at fáa ein góðan sáttmála, tí nú hava samráðingarnar drigið so langt út í kreppuna.

Hann heldur, at hevði Havnar Arbeiðsmannafelag fingið frið at samráðst, hevði borið til at fingið ein góðan sáttmála tí nú eru eini tvey ár síðani, at samráðingarnar byrjaðu og tey tøl, sum lógu á borðinum tá, eru onnur tøl enn tað er hugsandi, at tey arbeiða við nú. Men tað kom stígur í, tí Starvsmannafelagið hótti við verkfalli og tað støðu vildi Arbeiðsmannafelagið ikki koma samfelagnum í.

Tí gekk felagið við til útsetilsi eftir útsetilsi og nú heldur hann, at sum tíðirnar eru nú, fer valla at bera til at fáa ein so góðan sáttmála, sum tað annars lá í kortunum.